Standmyndin av Kjølbro avdúkað:

# Ein søguligur dagur fyri Klaksvíkina



Oda, Kitty og Esther vóru komnar heim til avdúkingina av standmyndini av pápa teirra

Mynd: Símun á Høvdanum

**Í fagrasta veðri var standmyndin av J.F. Kjølbro sunnudagin avdúkað í Klaksvík. Eini 1500 fólk vóru savnaði hesa løtuna at minnast hendan megnarmann, sum í tíð síni legði lunnar undir einum virknum vinnulívið her á staðnum**

AVDÚKING
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Sunnudagin upprann endiliga løtan, tá fyrsta standmyndin í Klaksvík varð avdúkað.

Hetta var ein søguligur dagur fyri býin, og tað vísti talið á uppmøttu fólkamongdini eisini.

Veðrið var av tí allarbesta, og eini 1500 fólk vóru savnaði saman á Biskupsstøð, har standmyndin av J.F. Kjølbro er reist.

At J.F. Kjølbro er fyrsti maður, ið standmynd er reist til minnis um, er ikki av tilvild.

J.F. Kjølbro er tann maður, sum hevur havt størst týdning fyri vinnulívið í Klaksvík.

Hann bygdi í tíð síni eina vinnufyritøku upp, hvørs stødd og styrki var ómetalig í mun til ta samlaðu framleiðsluna í samtíðarsamfelagnum.

Týdningurin av verki hansara setur enn merki sítt á býin.

Fleiri av fyritøkunum í býnum bera enn navn hansara, og er tað felag, hann bygdi upp, framvegis størsta vinnufyritøkan í býnum.

Kjølbro var eisini ein av teimum, sum í 1919 tók stig til at seta á stovn Norðoya Sparikassa, og er sjálv standmyndin ein gáva til Klaksvíkar bý frá Norðoya Sparikassa.

Gávan varð givin í sambandi við 80 ára føðingardagin hjá stovninum, og er hon evnað til av listarmanninum Hans Paula Olsen.

Hans Pauli hevur, umframt standmyndina av Kjølbro, eisini latið standmyndina av Nólsoyar Pálli og Traðarmanninum í Havn úr hondum.

## Døtrar avdúkaði standmynd

Standmyndin varð sunnudagin avdúkað á Biskupsstøð í Klaksvík. Staðið, har Kjølbro av fyrstani tíð byrjaði virksemi sítt í 1912.

Umframt tey 1500 fólkini, sum vóru møtt upp, var eisini stórur partur av familjuni hjá Kjølbro til staðar.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, byrjaði hátíðarhaldið við at flyta fram røðu um hendan megnarmann, sum hevur havt so stóran týdning fyri Klaksvíkina.

Vónin hjá honum var, at standmyndin av Kjølbro kann verða til eggjan og íblástur hjá teim, sum skulu bera landið víðari.

- Tey vinnuligu fótasporini eftir J.F. Kjølbro hava ómetaligan týdning fyri býin, og enn í dag heysta býur og land ávøkstur eftir virksemi hansara, segði borgarstórin millum annað.

Tá Steinbjørn hevði endað røðu sína, var tíðin komin til sjálva avdúkingina.

Kjølbro átti, saman við konu síni Karini, fimm børn, men av teimum eru bert trý á lívi í dag.

Tað eru tær tríggjar døtrarnar Oda, Kitty og Esther, og vóru teir eisini til staðar hendan sunnudagin.

Kitty og Esther høvdu fingið tillutað uppgávuna at avdúkað standmyndina, og gjørdi hetta løtuna enn meiri hátíðarliga og sera kensluborna.

Framvið standmyndini stóð øll familjan hjá Kjølbro savnað saman, tey flestu í føroyskum búnum.

Hetta var ein løta, sum flest allir klaksvíkingar fara at minnast aftur á í fleiri ár.

## Ótroyttiligan vilja

Eftir avdúkingina flutti sparikassastjórin, Eyðfinn Reyðberg, fram røðu.

Í røðu síni tók hann millum annað fram, at hetta var ein merkisdagur í býarinnar søgu.

Hann nýtti eisini høvið til at takka Hans Paula Olsen fyri standmyndina, sum hann hevur latið úr hondum.

- Kjølbro skapaði nógv góð virði fyri Klaksvíkina, og hevði hann ein ótroyttiligan vilja til at skapa og byggja upp, samstundis sum hann óræddur gekk nýggjar leiðir, segði Eyðfinn í røðu síni.

Eyðfinn nevndi eisini, at tað kann vera torført hjá tí yngra ættarliðnum at skilja og virðismeta týdninginin av tí arbeiðið, ið Kjølbro lat liggja eftir.

- Men Kjølbro tók álit á seg sjálvan, og vísti øðrum álit. Hann gloymdi ikki uppruna sína, men grundaði virksemi sítt á heimstaðin. Um onnur kunnu taka hetta upp eftir hann, so hevur býurin eina bjarta framtíð, segði sparikassastjórin.

Eyðfinn Reyðberg endaði røðu sína við at endurtaka spurningin, sum so ofta verður havdur á lofti: Hvønn týdning hevur Kjølbro havt fyri Klaksvíkina ?

- Spurningurin kann einans svarast við einum nýggjum spurningi. Nevniliga: Hvat hevði Klaksvíkin verið uttan Kjølbro?, endaði sparikassastjórin røðuna.

Eftir røðurnar spældi Klaksvíkar Hornorkestur nøkur løg, og eisini var felagssangur á skránni.

Eftir hátíðarhaldið varð skipað fyri eini hugnaløtu í Klaksvíkar Bókasavnið.



- Fleiri enn 1500 fólk vóru savnaði saman til avdúkingina av standmyndini av J.F. Kjølbro
Mynd: Símun á Høvdanum



# Sløkkiliðið fekk skeiv boð

**Eitt ungt par slapp út ígjøgnum loftsvindeygað, tá eldur var í einum húsum á Stongunum í Klaksvík leygarmorgunin. Sløkkiliðið fekk tó boð um, at eldurin var í einum húsum á hinum arminum í Klaksvík, men tíbetur varnaðist ein sløkkimaður, hvar eldurin í veruleikanum var**



*Eldur var í hesum húsunum á Stongunum í Klaksvík. Eldurin kundi breitt seg til húsini við síðuna av, tí eingin brandveggur er ímillum*

*Mynd: Símun á Høvdanum*

ELDSBRUNI
*Stefan í Skorini*

Sløkkiðið í Klaksvík kundi mist nakrar virðismiklar minuttir, tá liðið fekk skeiv boð um, hvar ein eldsbruni var. Eldur var í einum gomlum húsum á Stongunum, men sløkkiliðið fekk boð um, at eldur var á Klaksvíksvegi.

Tíbetur var ein av sløkkiliðsmonnum, sum varð tilkallaður, til arbeiðis nærhendis húsunum, og hann gav boð um at koyra norðureftir heldur enn eftir boðunum av alarmsentralinum. Tí kom sløkkiliðið á staðið beinanvegin og fekk bast eldinum.

Um brandbilarnir høvdu farið á ta skeivu adressuna, høvdu virðismiklir minuttir farið fyri skeytið, og eldurin hevði kanska breitt seg til grannahúsini, sum eru bygd uppí hesi húsini. Eingin brandveggur er ímillum húsini, og tí hevði hann breitt seg skjótari.

– Húsini høvdu verið farin fyri skeytið, um ein av okkara monnum ikki var til arbeiðis har á leiðini. Eldurin hevði kunnað breitt seg til grannahúsini, og so hevði skaðin verið nógv størri, sigur Esmar Klakstein, varaleiðari hjá Klaksvíkar sløkkiliði.

Langt er ímillum ta uppgivnu adressuna á Klaksvíksvegi og húsini á Stongunum, har eldurin var, tí tey eru á hvør sínum armi í Klaksvík.

Enn ber ikki til at siga við vissu, hvør hevur ábyrgdina av mistakinum. Antin er alarmsentralurin á politistøðini í Havn, ella hevur sentralurin hevur fingið skeiv boð frá viðkomandi í Klaksvík, sum ringdi at boða frá.

## Gomul hús

Talan er um eini lítil og gomul hús, sum Klaksvíkar kommuna eigur. Eldsbrunin er byrjaður í stovuni, men enn ber ikki til at siga við vissu, hvussu eldurin byrjaði. Illgruni er tó um, at eldurin byrjaði í eini sofu.

Maðurin í húsinum vaknaði stutt fyri klokkan tíggju leygarmorgunin við at ein rútur í stovuni brestur av hitanum. Hann fer upp og varnast, at húsini eru fylt við royki. Tí er ikki hugsingur um at sleppa niðurundir.

Parið mátti tí fara út ígjøgnum eitt loftsvindeyga. Fólk, sum høvdu varnast eldin, settu ein stiga upp, so fólkini kundu sleppa trygt niður.

Húsini hava fingið stóran skaða. Øll húsini hava fingið royksskaða, og niðara hæddin og serliga stovan eru illa brend. Grannahúsini hava eisini fingið nakað av royksskaða.

# Týskur trolari tikin

FISKISKAPUR
*Stefan í Skorini*



*Skiparin á týska trolaranum Bianca tók við bótini, sum hann fekk fyri at fiska á stongdari leið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Vaktarskipið Brimil kom sunnudagin á Havnina við týska trolaranum Bianca, sum fiskaði í einum stongdum kassa norðanfyri Fugloynna. Skiparin segði seg ikki vita av, at henda leiðin er stongd hesa tíðina á árinum. Hon er stongd frá 1. februar til juni.

Skiparin hevur fingið sektaruppskot, sum tilsamans er 304.000 krónur, og hann hevur tikið við bótini. Hald er lagt á veiðuna og fiskireiðskapin, og skiparin skal rinda 100.000 krónur í bót. Veiðan er virðismett til 60.000 krónur og reiðskapurin til 144.000 krónur.

Skipið hevur bara verið í føroyskum sjógvi í tveir dagar og hevði bara eini tólv tons í lastini, tá Brimil kom fram á tann lítla týska trolaran Bianca, sum hevur heimstað í Cuxhaven.

## Funnu granat á vágni

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Fríggjadagin funnu arbeiðsmenn hjá J & K Petersen eina granat á Havnarvág. Í sambandi við arbeiðið at dýpa havnina, hava arbeiðsmenninir fleiri ferðir funnið granatir.

Serfrøðingar frá Marinustøðini taka sær av slíkum lutum, ið kunnu vera vandamiklir, Løgreglan og arbeiðseftirlitið avbyrgdu økið fyri óviðkomandi, meðan fólk beindu fyri granatini.

## Koyrdi fullur og fór útav

FERÐSLUÓHAPP
*Stefan í Skorini*

Sunnnumorgunin fekk løgreglan í Runavík fráboðan um eitt ferðsluóhapp á landsvegnum norðanfyri Norðskála.

Ein ungur maður, sum slapp væl frá óhappinum, var farin útav í einum persónbili. Hann verður tó skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring, tí royndin vísti, at hann var koyrdi ávirkaður. Tað vísti seg eisini, at maðurin heldur ikki hevði nakað koyrikort at vísa, og hetta verður hann skuldsettur fyri.

Maðurin var einsamallur í bilinum.

## Sigldi fullur av bátastevnu

SIGLING
*Stefan í Skorini*

Sunnumorgunin stóð løgreglan fyri einum báti, sum kom inn í Skopun. Maðurin, sum førdi bátin, hevði siglt ávirkaður úr Vestmanna til Skopunar.

Maðurin hevði verið á bátastevnu í Vestmanna, og hann hevur verið nakað skjótur avstað í bátinum. Fólk í Vestmanna boðaðu løgregluni frá, at ein fullur maður var farin við báti.

MRCC-støðin fekk síðani boðini, og hon fekk samband við bátin, sum tá var staddur í Skopunarfirði. Tí fór eingin at leita eftir bátinum, men løgreglan bíðaði eftir honum á bryggjuni.

Løgreglan tók eina blóðroynd av manninum, og hann kann vænta sær eina bót.